

*At tað er ár teirra brekaðu, fer rættuliga at seta sín dám á norðoyastevnuna í ár*

# Ár teirra brekaðu setur dám á

**Í sambandi við at tað er ár teirra brekaðu, verða nógv ymisk og spennandi tiltøk á norðoyastevnu, har tey sum bera brek fara saman við teimum, sum ikki bera brek at seta dám á stevnuna**

Í STEVNUHÝRI
*Solby A. Eliasen*

MBF hevur verið í Klaksvík fram til norðoyastevnu og havt fundir við mentunarnevnd býráðsins og onnur við um møgulig tiltøk á norðoyastevnu.

Ætlanin er at broyta setanina av stevnuni, soleiðis at tað verður meira tónleikur at hoyra. Emma´s blues band fer at syngja og spæla til sjálvan setanina og eisini verða aðrir kendir bólkar á skránni. Ætlanin er so eisini, at Emma´s blues band skal spæla saman við hinum bólkunum til setanina av norðoyastevnu.

Fyrireikararnir hava somuleiðis tosað um at lata Emma´s blues band spæla til dans ein part av fríggjakvøldinum.

Framsýning er eisini á skránni á norðoyastevnu. Tað eru tey vardu verkstøðini í Klaksvík, Havn og Runavík saman við teimum ymsu limafeløgunum í MBF, sum standa fyri henni. Talan er um eina listaframsýning, har tekningar og annað, sum starvsfólkið á verkstøðunum hevur gjørt. Harafturat fara limir úr teimum ymsu limafeløgnum at hava ymisk tól við, sum gera tað møguligt hjá einum at seta seg inn í støðuna hjá teimum. Til dømis fer deyvafelagið at vísa, hvussu tað er at hava tinitus.

Somuleiðis fara røðurnar sum verða hildnar til midnáttarsamkomuna og fólkafundin at verða hildnar av fólki, sum vara av teimum brekaðu.

Jórun Høgnesen, forkvinna í mentunarnevndini í Klaksvíkar býráð, heldur tað vera sera týdningarmikið, at ár teirra brekaðu kemur at seta sín dám á norðoyastevnu, og hon vónar, at tað fer somuleiðis at seta dám á hinar summarstevnurnar í ár.

– Norðoyastevna er eitt gott høvi til at varpa ljós á ár teirra brekaðu, sigur Jórun Høgnesen.










*Manningin á Sundabátinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Norðuri í Sundi aftur á róðrarkortið

**Formaðurin heldur, at teir í Norðdepli/ Hvannasundi nú eru við fyri at læra, og harvið roknar hann ikki við, at nýggja 6–mannafarið fer at avrika tað í ár, sum Norðingurin gjørdi miðskeiðis í 60 unum**

NORÐDEPLI/ HVANNASUND
*Jóannes Hansen*

Tað liggur í navninum, at Norðoyastevnan er fyri norðoyingar og ikki bara klaksvíkingar. Tí er ikki annað enn nátúrligt at lodda dýpið fyri at vita, hvussu landið liggur norðuri í Sundi, sum tað verður nevnt í Norðoyggjum. Har flotaðu tey flaggdagin nýggja 6–mannafarið, Sundabátin, sum Sámal Hansen hevur smíðað.

Saman við Árnafirði gjørdu teir í Hvannasundi og Norðdepli rættuliga um seg í kappróðri miðskeiðis í seksti árunum. Sundamenn høvdu 10–mannafarið Norðingin, sum vann FM kappingina í 1965 og 1966, og árnfirðingar høvdu 8–mannafarið Árnfirðing, sum vann FM í 1966, 1967 og í 1968. Hetta var undir gomlu skipanini, tá ið FM varð avgjørt í einum róðri aftaná ólavsøku.

– Vit eiga framvegis 10–mannafarið, og vit hava hoyrt um avrikini, sum vórðu framd við honum. Vit í nevndini eru so mikið ungir, at vit av góðum grundum ikki minnast hetta, men tað hevur verið óført.

Hetta sigur Niels í Buð, sum er formaður í endurreista kappróðrarfelagnum. Saman við honum í nevndini eru Sigmar Sørensen, Vilhelm Hansen, Jákup Justesen, Brian Nýggjagarð, Símun Pætur Olsen og Martin Simonsen.

Sundabáturin er mannaður við monnum, men ikki við kvinnum. Við hesum og nevndarsamansetingini í huga kann staðfestast, at kvinnurnar eru ikki uppi í kappróðrinum norðuri í Sundi:

– Vit royndu at fáa kvinnumanning til nýggja bátin, men tað miseydnaðist. Men tað verður vónandi betri eitt annað ár.

Vóna tit at røkka langt í ár?

– Vit eru við fyri at læra, sum tað plagar at verða tikið til. Tveir av teimum, sum rógva við, vóru í fjør við til at manna Fípuna Føgru í Klaksvík. Hinir hava ongantíð róð áður. Men tað verður dúgliga vant, og so fáa vit at síggja. Klaksvíkingar hava verið ógvuliga hjálpsamir. Báturin hevur síðstu vikurnar staðið í neystinum hjá teimum, og vit hava vant á Vánni í Klaksvík nú undan Norðoyastevnuni. Vit fara eisini at ferðast saman við teimum, so vit kunnu ikki siga annað, enn at samstarvið er gott við grann-arnar, sigur Niels í Buð, formaður í Norðdepils-Hvannasunds Róðrarfelag.

Teir, sum manna nýggja Sundabátin, eru Martin Simonsen, sum stýrir, og Tordur Sigurðsson, John Mortensen, Christian Guttesen, Rúni í Frammistovu, Jógvan Jóhan Lorenzen og Gunnar Andreassen.

Tá ið báturin fyrstu ferð varð flotaður, var hátíðarhald. 5–mannafarið Ritan, sum felagið luttók við síðsti í seksti árunum og onkuntíð fyrst í sjeyti árunum, varð flotað, og Pól Jóhannesen, trúboðari, segði nøkur orð. Hann takkaði vegna róðrarfelagið fyri góða fíggjarliga stuðulin, og so fingu róðrarfelagið og bátsmanningin at vita, hvat tað varð roknað við av teimum:

– Tit eru fyrimyndir hjá bygdunum her í Tronganum, og vit vóna, at tit verða góðar fyrimyndir.

# Klaksvíkingur eigur bara ein sigur

**Síðani farið varð undir FM kappróður hevur Klaksvíkingurin ongantíð vunnið FM, og í heimasjógvi hevur 10–mannafarið bara vunnið eina ferð vunnið í 40 ár**

KAPPRÓÐRARHAGTØL
*Jóannes Hansen*

Norðoyastevnurnar, tá ið klaksvíkingar hava verið so gestablíðir, at teir hava latið fremmandu kapprógvararnar fara við øllum silvurinum, hava verið nógv fleiri, enn stevnurnar, tá ið klaksvíkingar hava vunnið.

Í 2001 vunnu tríggjar manningar hjá Klaksvíkar Róðrarfelag FM, og tað árið vunnu allar hesar manningarnar á norðoyastevnu. Talan var um Fípuna Føgru við gentum, Páll Fanga við kvinnum og um Nevið Reyða.

Í fjør bjóðaðu klaksvíkingar seg fram við nýggjum 10–mannafari. Eftir glæsiligu úrslitini við 8–mannafarinum árið fyri, kundi tað tykjast sum um, at dreymurin um, at 10–mannafarið skuldi vinna á norðoyastevnu og rættuliga vera við í FM kappingini, sum Klaksvíkingur ongantíð hevur vunnið, skuldi gerast veruleiki, men tað eydnaðist ikki. Kappingin frá Havnarbátinum, Eysturoyinginum og Vestmenninginum var eirindarleys, og Klaksvíkingurin endaði á fjóðra plássi, sjálvt um teir í fleiri av teimum seks FM róðrunum kendu fjarstøðuna fram til fremsta plássið at vera lítla.

2003 er fjørutinda árið, at tað verður kappast um FM í róðri. Frá 1964 og til og við 1972 varð skipað fyri serligari kapping um FM, eftir at stevnuróðrarnir høvdu verið. Síðani 1973 hevur skipnin við stigum verið galdandi. Tað vil við øðrum orðum siga, at 2003 er 40. árið, at tað ber til at vinna FM í kappróðri, og at tað í ár eru 30 ár síðani, at tað varð farið undir FM kappingar í tí líki, sum tær nú eru kendar.

Higartil hava klaksvíkingar vunnið tólv FM heiti – fimm undir gomlu skipanini og sjey undir galdandi skipan. Fípan Fagra við dreingjamanning vann FM í 1964, og genturnar á Fípuni vunnu í 1965, 1966, 1967 og í 1969. Genturnar vunnu aftur í 2001. Kvinnurnar umborð á Páll Fanga hava vunnið í 1986, 1987, 1989, 1990 og í 2001, og Nevið Reyða vann í 2001.

Síðani 1970 hevur 10–mannafarið í Klaksvík ongan FM róður vunnið. Tað árið vann Klaksvíkingur tríggjar róðrar – á norðoyastevnu, á jóansøku og á vestanstevnu. Teir, sum mannaðu spildurnýggja bátin á norðoyastevnu hetta árið, og harvið eru teir einastu, sum hava vunnið í heimasjógvi í Klaksvík, síðani tað varð farið undir FM kappingar, vóru hesir: Martin Jacobsen – Einar Thomassen, Kjartan Thomassen, Karl Jákup Petersen, Petur Hans Poulsen, Ólavur Johannesen, John Danielsen, Jákup Sørensen, Hanus Hansen, Svenning Eysturdal og Torleif Sigurðsson, ið var 22 ára gamal aldursforseti og bátsformaður.